Skatturin ov langt burturi

Dan R. Petersen vil hava landsst‡rismannin í fíggjarmálum at endurreisa Toll- og skattstovuna í Fuglafir›i. Ta› er ov langt at skula koyra til Runavíkar at avgrei›a toll- og skattavi›urskifti

TÆNASTUVINNA
Magnus Dam

Hóast samskifti› vi› Toll- og skattstovu Føroya aloftast sn‡r seg um at skula lata pengar frá sær, so eru nøkur, sum vilja hava eitt tættari samskifti vi› Toll- og skattstovuna.

Dan R. Petersen, tingma›ur úr Fuglafir›i, f‡list í einum fyrispurningi til Karsten Hansen, fíggjarmálará›harra, á, at ta› ikki ber til at avgrei›a síni toll- og skattavi›urskifti í Fuglafir›i. Gjaldstovan í Fuglafir›i var› ni›urløgd undir kreppuni í 1993, og sí›ani tá hava borgararnir í Fuglafjar›ar kommunu veri› noyddir at koyra til Runavíkar, um teir hava ørindi hjá Toll – og skattstovuni.

Ov langt at fer›ast

Nú tí›irnar eru gó›ar aftur, vil javna›artingma›urin hava at vita, um ta› ber til at endurreisa Toll- og skattstovuna í Fuglafir›i. Hann heldur, at ein so stór kommuna sum Fuglafjar›ar kommuna eigur at hava sína egnu Toll- og skattstovu. Ta› er ein meinbogi, at einasta avgrei›slan liggur 20 kilometrar burturi.

– Vinnulívi› í Fuglafir›i blómar, og fólk forvinna pening sum ongantí› fyrr. Fugjafjar›ar kommuna er tann fimta størsta í landinum, men í framlei›sluvir›i bæ›i til útflutnings og heimamarkna› er hon nummar eitt. Skal vinnan mennast og stø›ast og fólki› trívast á sta›num, eigur landi› at ganga undan og gera karmar og skapa umstø›ur, sigur Dan R. Petersen í vi›merkingunum.

Í samsvar vi› samgonguskjali›

Tingma›urin vísir á, at nógv vi›urskifti kunnu grei›ast um telefonina, men nógv onnur kunnu bert grei›ast á sta›num. Somulei›is vísir Dan R. Petersen á samgonguskjali›, har ta› millum anna› stendur, at partar av almenna sektorinum skulu leggjast nærri borgarunum, at dentur skal leggjast á økismenning, og at tænastur skulu flytast nærri borgaranum.

– Út frá hesum lyftunum og umstø›unum í huga, slepst ikki undan hjá landsst‡rinum at endurstovna Toll- og skattstovuna í Fuglafir›i, sigur tingma›urin í fyrispurninginum til Karsten Hansen

Nýggja og spennandi fløgan

»A Matter of Time«

við Torkil Mørkøre

fæst nú í sølubúðunum
kring alt landið
Kostnaður 159 kr.

Ger vart vi› útja›aran

Hendrik Old, løgtingsma›ur, vil hava at vita, hvat Oljumálast‡ri› ger fyri at tryggja útja›aranum lut í einari komandi oljuvinnu

OLJUVINNA
Magnus Dam

Tí›in styttist, til oljufeløgini av álvara fara undir at leita eftir olju í føroysku undirgrundini. Feløgini hava fingi› síni leitiøki›, og næsta ár seta tey borin í tjúkka føroyska basalti›. Hendrik Old, tingma›ur hjá Javna›arflokkinum, hevur í hesum sambandinum sett Ey›un Elltør, landsst‡rismanni í oljumálum, ein fyrispurning um leiklutin hjá útja›aranum í oljuvinnuni.

Ásett í lógini

Tingma›urin vil hava landsst‡rismannin at grei›a frá, um Oljumálast‡ri› roynir at tryggja sær, at útja›arin eisini fær lut í virkseminum. Tá i› lógin um fyrsta útbjó›ingarumfar var› vi›gjørd í løgtinginum tí›liga í ár, samtykti løgtingi› eitt broytingaruppskot um, at landsst‡risma›urin skal leggja dent á, at leitingar- og framlei›sluvirksemi› úr Føroyum eisini fer fram í útja›aranum.

– Hvørji stig hevur landsst‡risma›urin tiki› fyri at tryggja sær, at hendan greinin í lógini um fyrsta útbjó›ingarumfar ver›ur fylgd, spyr Hendrik Old.

Sí›sta útkall

Tingma›urin sigur í vi›merkingunum til fyrispurningin, at ta› nu helst er sí›sta útkall. Oljufeløgini eru farin at innheinta tilbo› uppá útger›arstø›ir, og sum skilst, er ætlanin hjá oljufeløgunum at skipa seg um eina útger›arstø›. Fleiri eru um bo›i›. Drelnes á Tvøroyri, Sund, Runavík og Havnin hava gjørt mest vart vi› seg, men enn hava oljufeløgini ikki tiki› endaliga avger›.

Tí vil tingma›urin hava at vita, hvørjar treytir landsst‡risma›urin hevur sett oljufeløgunum, sum tryggja, at lógin ver›ur fylgd og útja›arin fær sín lut í virkseminum.

Á tingfundinum í gjár, samtykti løgtingi› at Ey›un Elltør skal svara fyrispurninginum.

Vilja var›veita rentustu›ulin

Teir bá›ir stóru andstø›uflokkarnir eru um at vera lidnir vi› fyrireikingunum av lógaruppskoti›, sum skal tryggja setúsaeigarum móti fellandi rentustu›uli

SETHÚSAFÍGGING
Jákup Mørk

Javna›arflokkurin og Sambandsflokkkurin leggja í løtuni seinastu hond á fyrireikingarnar til eitt broytingaruppskot, sum skal tryggja, at rentustu›ulin framhaldandi ver›ur 48%.

Lógin um rentustu›ulin ásetur annars, sum nevnt í bl›anum í gjár, at rentustu›ulin fram til 2003 skal minka›, solei›is at hann tá kemur ni›ur á 40%. Fyrsta ári› ver›ur lækkingin 4% og tey bæ›i fylgjandi er talan um 2%.

Stu›ulin til rentuútei›slur var› í sínari tí› hækka›ur í eitt fyribils ásett tí›arskei›, sum ein partur av hjálpini til sethúsaeigarar.



Fíggingarmysntri› fyri sethús eigur at endursko›ast, heldur Hans Pauli Strøm

Hækkandi renta og kostna›arstø›i

Hans Pauli Strøm, tinglimur hjá Javna›arflokkinum, sigur, at orsøkin til broytingaruppskoti› er hækkandi kostna›arstø›i og rentan. Eisini hóast hækkandi kostna›arstø›i› partvíst skyldast lønarhækkingunum, sum hava veri› á arbei›smarkna›inum.

Hann vísir á, at hetta, sum er, vi›førir eina hækkandi útrei›slu fyri húsarhaldi›. Serliga hjá teimum, sum n‡liga hava bygt, og sum kanska ikki hoyra ti teirra vi› høgari inntøku. At minka um rentustu›ulin vil fyri hesi vera at leggja stein oman á byr›u, heldur tingma›urin.

Har umframt skjóta flokkarnir í uppkotinum eisini upp, at marki› fyri rentustu›ul ver›ur broytt. Í bla›num í gjár nevndu vit, at marki› í løtuni er ein rentuupphædd av 60.000 kr., men at hetta eftir umsókn kann hækkast upp í 120.000 kr.

Flokkarnir mæla til, at tá hækkanin upp í 120.000 bert er ein avgrei›sluspurningur, sum ongantí› ver›ur nokta›ur, er ta› lættari umsitingarliga at áseta eitt mark á 120.000 kr., sum so ikki kann broytast. Eisini fyri at sleppast kann undan teirri óhepnu stø›u, at eitt húski brádliga missur rentustu›ulin, uttan at hava møguleika fyri at gera naka› vi› máli›.

Um útlitini fyri at fáa uppskoti› samtykt, heldur Hans Pauli Strøm, at hesi ikki tykjast heilt av lei›.

Hann vísir á, at politikkarar úr ø›rum flokkum, eitt nú Fólka- og Sjálvst‡risflokkinum, á›ur hava víst á trupulleikan, og at ta› tí væl kann hugsast, at uppskoti› hevur undirtøku ímillum samgongupolitikkarar.

Endursko›a fíggingarmynstri›

Annars leggur Hans Pauli Strøm afturat, at eftir hansara tykki er tí›in komin til at endursko›a markna›in fyri sethúsafígging.

Hann vísir á, at nú bankarnir í størri mun hava lagt seg eftir at veita seriulán, heldur enn annuitetslán, rakar ein rentuhækking lántakaran vi› størri kraft enn á›ur.

Eisini vísir hann á rentuhækkanina, sum Húsalánsgrunnurin herfyri var› noyddur at gera. Hann sigur í hesum sambandi, at eitt av endamálunum vi› Húsalánsgrunninum er, at broyttar markna›artreytir í minni mun skulu ávirka sethúsaeigaran.

Hvørt ein n‡ggj loysn á hesum øki skuldi veri› ein realkreditstovnur ella okkurt heilt anna›, vil Hans Pauli Strøm ikki taka stø›u til, men hann heldur fast um, at ta› er tiltrongt vi› eini vi›ger› av fíggingarmynstrinum.

Fullveldiskoti› lati› heimleysum

Butterfly frá Óla Breckmann og fullveldiskoti› hjá Høgna Hoydal eru millum lutirnar, sum leygardagin ver›a seldir á stórari uppbo›ssølu í Rás 2 til frama fyri Herbergi› hjá Frelsunarherinum

UPPBO‹SSØLA
John Johannessen

Serstakasti luturin, sum ver›ur seldur á stóru uppbo›ssøluni leygardagin til frama fyri Herbergi› hjá Frelsunarherinum er helst fullveldiskoti› hjá Høgna Hoydal.

Høgni Hoydal hevur, sí›ani hann gjørdist landsst‡risma›ur, n‡tt føroyska koti› sum eitt slag av ey›kennismerki fyri seg og sín politikk. Hann eigur tvey sokalla› fullveldiskot. Anna› hevur omma konu hansara, Hanna Lindenskov, sjálv veva› og lati› honum sum gávu. Hitt hevur hann keypt.

Koti›, sum Høgni Hoydal hevur lati› Frelsunarherinum, er koti›, sum hann sjálvur hevur keypt. Hitt koti› vildi hann ikki lata, tí talan var um eina persónliga gávu frá ommu konuna, sum hann vir›ismetir høgt. Hetta koti›, ætlar hann, framvegis skal vera ímynd fyri seg og sín politikk.

– Men eg vildi fegin lata hitt koti›, tí talan er um eitt vælgerandi endamál, sum eg vil stu›la so nógv, sum eg kann.

Undirhaldssending

Uppbo›ssølan er skipa› sum ein 7-8 tíma long undirhaldssending, sum ver›ur send í Rás 2 leygardagin. Á skránni ver›ur umframt uppbo›ssøluna, musikcafé, tónleikur, sangur og anna› skemt. Vertir í sendingini vera Óla Jákup Rólantson og Sonne Smith.

Umframt fullveldiskoti› hjá Høgna Hoydal og sloyfuna hjá Óla Breckmann ver›a eisini a›rir lutir vi› tilkn‡ti til politiska lívi› í Føroyum seldir á uppbo›ssøluni. Løgma›ur hevur lati› eitt sigera› eintak av Hvítubók vi› fylgisskjølum og Tórbjørn Jacobsen hevur lati› ein tummastokk.

Afturat politisku lutunum hava kend listarfólk lati› listarverk til uppbo›ssøluna. Millum listarfólkini eru Ingálvur av Reyni, Eyvindur Mohr, Amariel Nor›oy, Kári Sverrisson, Ey›un av Reyni og Bibi Sigmundardóttir.

Uppbo›ssølan er solei›is skipa›, at umlei› hálvan hvønn tíma ver›ur kunngjørt, hvat bo›i› er uppá ymisku lutirnar. Hamarin fellur á midnátt.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.



Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.

299,-

Jógvan Arge